Stovna Oljuvinnufelagið 2. apríl

Áhugin hjá føroyskum fyritøkum at vera við í eini komandi oljuvinnu er so stórur, at Vinnuhúsið og Oljubólkurin undir Føroya Arbeiðsgevarafelag hava gjørt av at stovna felag fyri føroyskar fyritøkur í oljuvinnuni

OLJUÁHUGAFELAG
Jan Müller

Mánadagurin 2. apríl kann gerast ein varði í føroyskari vinnusøgu. Tí henda dagin er ætlanin at stovna eitt sokallað "bransjufelag" fyri allar føroyskar fyritøkur, sum eru ella ætla sær at vera við í eini komandi oljuvinnu. Tað er Vinnuhúsið/Føroya Arbeiðsgevarafelag, sum tekur stig til hetta áhugaverd a tiltakið. Higartil hava áhugmálini hjá føroyskum fyritøkum, sum virka í oljuvinnuni, verið umsitin av Vinnuhúsinum og Oljubólkinum hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Nú meira "kjøt" bráddliga er við at koma á nýggju vinnuna eru avbjóðingarnar og harvið eisini umsitingarliga arbeiðið nógv størri. Tað er hetta, sum tey í Vinnuhúsinum hava sannað. Eitt fólk varð herfyri sett til at taka sær av at samskipa uppgávur í sambandi við nýggju oljuvinnuna. Og tað er greitt, at tað verður nógv at tríva í og halda skil á, nú ein heilt nýggj og stór vinna ger innrás í oyggjarnar.

Oljubólkurin hevur í dag skrásett 145 føroysk virki og fyritøkur, sum siga seg hava áhuga fyri at vera við í ella fylgja við í komandi oljuvinnuni. Fyribils er so skotið upp at kalla nýggja felagið fyri "Oljuvinnufelagið" og kemur tað at verða bygt upp eins og t.d. Havbúnaðarfelagið, sum í dag er áhugafelagið hjá teimum føroysku alarunum.

Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum sigur seg vóna, at tað verður stór undirtøka til aðalfundin. Hann heldur sjálvur, at hetta er rætta løtan at fara undir at stovna hetta felagið, tí nú verður av álvara farið í gongd við nýggju vinnuni. Hann ivast ikki í, at tørvur er á slíkum felag, tí mangt bendir á, at komandi oljutilgongdin fer at síggjast aftur í øllum tí føroyska samfelagnum. Tá er umráðandi at eisini føroysku fyritøkurnar hava sítt egna felag og har eisini kunnu tosa við einari rødd. Tað skal so aftur lætta um samskiftið við bæði myndugleikar og útlendsku feløgini, sum á ein ella annan hátt fara at hava tilknýti til komandi útviklingin í Føroyum.



Danir fara at krevja privatisering

– Vit kunnu ikki rokna við at fáa blokkstuðul úr danska statskassanum og framhaldandi hava so stór aktiv liggjandi hjá tí almenna, sum annars kunnu privatiserast. Hetta eigur man at gera sær púra greitt, líka mikið um man er til høgru ella til vinstru í politikki sigur løgmaður, sum eisini heldur tað vera rætt við partabrævamarknaði, soleiðis at vanligi føroyingurin kann gera íløgur í partabrøv heldur enn bara at kunna seta pengarnar inn á uppsparing í peningastovunum

SJÁLVSTÝRI OG PRIVATISERING
Jan Müller

Nú landsstýrið hevur lagt uppskot fyri tingið um yvirtøkur og minking av blokki hava vit spurt Anfinn Kallsberg, løgmann, um privatiseringar er lyklaorðið og fortreytin fyri at kunna fara undir nýggja sjálvstýrisleistin?

– Nú skulu vit minnast til, at danska stjórnin í samráðingunum hevur sagt, at einar sjálvstøðugar Føroyar hava við sær fýra ára skiftistíð. Danir hava eisini fleiri ferðir undir samráðingunum sagt, at vit hava ein sterkan búskap í løtuni og ikki minst, at vit hava nakrar reservar í almennum høpi, har helvtin av bankakervinum og stórur partur av vinnulívinum er í almennum regi sigur løgmaður, sum samtíðis vísir á, at bæði í Danmark og Noregi hava sosialdemokratiskar stjórnir framt álvarssamar privatiseringar av fyritøkum, sum eru nógv meira almennar enn tað vit kenna til. Tí heldur løgmaður, at hvat enn hendir, kunnu vit ikki rokna við at fáa blokkstuðul úr danska statskassanum og framhaldandi hava so stór aktiv liggjandi hjá tí almenna, sum annars kunnu privatiserast. Hetta eigur man at gera sær púra greitt, líka mikið um man er til høgru ella til vinstru í politikki.

Løgmaður ivast heldur ikki í, at málið um privatisering fer at verða tikið upp av donsku stjórnini fyrr ella seinni. – Tað, sum allir fíggjarfrøðingar siga, er, at vit hava stór aktiv í almennum høpi. Tað ræður so um at syrgja fyri at hava ein eftirspurning, áðrenn farið verður at bjóða út, tí annars fær man einki skilagott úrslit burtur úr. Og fyri at kunna geva tí meiniga føroyinginum møguleika at vera við, so heldur løgmaður, at neyðugt er við einum almennum útbjóðingarstað. Tað er tann skipanin, sum íslendingar brúka og sum føroyingar eisini hava hugt at. Hon skal vera grundarlag undir eini føroyskari skipan á hesum øki.

– Tað ber ikki til at privatisera almennar fyritøkur við bara at selja tær út til nakrar stórar íleggjarar. Tað er heldur ikki tað vit ætla. Vit ætla, at hetta skal vera atgongdin hjá hvørjum einstøkum føroyingi at gera eina íløgu. Tí er tað neyðugt við einum partabrævamarknaði í Føroyum sigur Anfinn Kallsberg, sum heldur, at tað kann gott vera, at hann skal gerast í samvinnu við ein annan partabrævamarknað, soleiðis at tú ikki hevur ta stóru umsitingina ol. Hetta er so ein fyritreyt fyri í heila tikið at fara undir privatiseringar. Harnæst er tað ein fortreyt fyri, at vanligi føroyingurin uttan hóvasták og lagaligari kann gera íløgur í aðrar privatar fyritøkur í Føroyum.

Anfinn Kallsberg, løgmaður: - Ein partabrævamarknaður er fortreyt fyri, at vanligi føroyingurin uttan hóvasták og lagaligari kann gera íløgur í aðrar privatar fyritøkur í Føroyum

– Løgmaður sigur seg tí ikki vera samdan í tí, sum samfelagsfrøðingurin Súni á Dalbø segði í sendingini, sum danska sjónvarpið herfyri gjørdi um Føroyar. Í tí sendingini segði Súni á Dalbø, at tað er skeivt at fara undir privatisering av almennum fyritøkum í sambandi við ein partabrævamarknað um somu tíð, sum oljuvinnan fer í gongd og útlendsk oljufeløg fáa fast undir fótum í Føroyum.

– Heldur man fast við, at vit ikki skulu hava nakran partabrævamarknað í Føroyum og verður hildið fast við almennu íløgurnar, er vandi fyri, at almennu fyritøkurnar, eitt nú Føroya Telé ikki fáa ta neyðturviligu kapitaltilgongdina fyri at kunna halda seg ajour og til tess at kunna gera tær íløgur, sum skulu gerast fyri at fylgja við tiðini. Men tað krevur nógv. Og tað er har ein partabrævamarknaður, sum er myntaður uppá, at vanligi uppspararin kann gera íløgur í partabrøv í skilagóðar fyritøkur – ístaðin fyri sum nú bara at vera vístur til at seta pengarnar inn á uppsparingkonto í føroyskum peningastovnum – kemur inn.

Føroya Banki er millum almennu fyritøkurnar, sum ætlanin helst er at privatisera

Lønarhækking kann blíva boomerangur

– At hækka lønirnar kann blíva ein boomerangur, sum gongur út yvir okkum øll. Tí vil eg appelera til allar kreftir um at seta seg niður og finna út av, hvat er best fyri hetta samfelagið sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður nú sáttamálasamráðingar standa fyri framman

GÓÐU TÍÐIRNAR OG FAKFELØGINI
Jan Müller

Anfinn Kallsberg, løgmaður: -Tá man er ein partur av einum samfelag kann man ikki bara hugsa um seg sjálvan. Tað kann arbeiðarin ikki, tað kann arbeiðsgevarin ikki og tað kann tað almenna heldur ikki. Hetta er ein størri eind, sum skal ganga upp og hyggja vit ikki eftir hvørjum øðrum, so gongur tað útyvir bæði arbeiðsgevarar-, arbeiðarar og samfelag

Nú hetta landsstýrið fleiri ferðir hevur brúkt góðu tíðirnar og stóru yvirskotini á fíggjarlógunum sum eina grundgeving fyri at kunna fara undir at yvirtaka málsøki og minka um blokkin hava vit spurt løgmann, um hann ikki eisini hevur roknað við, at fakfeløgini vilja hava lut í hesum góða úrsliti og tí fara at seta strong lønarkrøv!

– Tað er gleðiligt, at tað hevur gingið so væl í samfelagnum. Tað vil tó vera ótrúliga óheppið, um man setir henda útviklingin yvir stýr, tí man ikki hevur tey neyðugu fyrilitini yvirfyri hvørjum.

– Men hvat nú um fakfeløgini krevja t.d. 20% í lønarhækking, nú seinasta lønarhækkingin er vorðin uppetin av prísvøkstrinum?

Løgmaður vísir til kreppuárini í Føroyum. Tá vaks lønin ikki og keypiorkan minkaði heldur ikki. Síðani hava vit fingið lønarvøkstur, men tað sær út til, at sjálvt um tú hevur fingið ein hampuligan lønarvøkstur er keypiorkan ikki vaksin tilsvarandi. Løgmaður heldur tí ikki, at skipanin við, at man bara skal hava meiri í løn fyri at hála inn aftur minkandi keypiorkuna er nøkur loysn í sær sjálvum.

– Tí tað er, hvat tú hevur eftir í lummanum, tá alt er farið av, sum er tað avgerandi. Pumpa vit eitt høgt lønarlag upp við tilsvarandi hægri útreiðslustøði oyðileggja vit okkara kappingarføri. Tá vit so skulu út at kappast á altjóða marknaðinum, merkir tað, okkara vøra ikki kappingarfør í mun til tað, sum aðrir kunnu framleiða. Tað loysir seg tá ikki at framleiða hesa vøruna í Føroyum. Og tað ber aftur í sær, at tað, sum annars kundi loyst seg at framleitt í Føroyum, fellur niðurfyri, tí tað loysir seg ikki. Tá hava vit øll somul mist meira fyri minni.

Komnir ov stutt

– Tit í Fólkaflokkinum hava fleiri ferðir víst á, at tað skilabesta er heldur at lækka skattin og eisini minka um útreiðslurnar í almenna sektorinum, men tað hava tit als ikki klárað at livað upp til, nú tit hava stýrt í 3 ár!

– Eitt sindur er komið, men eg eri samdur í, at hetta er alt ov lítið. Hvørja ferð man fær eina lønarhækking í samfelagnum, so fara eini 65%, her hugsi eg bæði um skatta og avgjalddstrýst, aftur í teir almennu kassarnar. Tí er okkara boðskapur at kompensera fyri dýrtíðina við at lækka skattatrýstið, tí harvið oyðileggur tú ikki kappingarføriið. Fyri tann eintaka er tað líka frægt, at tú fær minni útreiðslur heldur enn størri inntøkur.

Løgmaður sigur, at teir hava lækkað skattatrýstið við einum 40 mill. kr, men trupulleikin er tann, at útreiðslurnar eru eisini hækkaðar, og tað er serliga oljan.

Løgmaður vísir á, at tað afturhaldið, sum hevur verið í hesum útviklinginum gjøgnum øll 90-ini, skal nú fáast frá hondini uppá ein gang, allir prísir skulu upp osfr. Hann heldur tað vera sera óheppið, at man ikki hevur strangt eftirlit við tí. – Og nú at hækka lønirnar kann blíva ein boomerangur, sum gongur út yvir okkum øll.

Tí vil eg appelera til allar kreftir um at seta seg niður og finna út av, hvat er best fyri hetta samfelagið.

Mugu hugsa um samfelagið

– Men mugu fakfeløgini ikki fyrst og fremst hugsa um, hvat er best fyri teirra limir?

– Jú jú men tá man er ein partur av einum samfelag kann man ikki bara hugsa um seg sjálvan. Tað kann arbeiðarin ikki, tað kann arbeiðsgevarin ikki og tað kann tað almenna heldur ikki. Hetta er ein størri eind, sum skal ganga upp og hyggja vit ikki eftir hvørjum øðrum, so gongur tað útyvir bæði arbeiðsgevarar-, arbeiðarar og samfelag, og tað var tað vit sóu í 90-unum. Arbeiðsloysið fór upp á 25%, so tað loysir ongar trupulleikar, tvørturímóti.

– Men er tað ikki eitt sindur øvugt nú at skula hoyra tykkum í Fólkaflokkinum tosa um at minka um tær almennu útreiðslurnar, tá tit so sita í 3 ár og tvørturímóti hava økt um hesar útreiðslur?

– Almennu útreiðslurnar eru sjálvandi nógv vaksnar, men eg vil siga, at tær kundu verið vaksnar nógv meira. Anfinn Kallsberg vísir, at teir hava megnað at fáa eitt yvirksot uppá meira enn 600 mill. kr. Og sjálvandi kundi man koyrt teir pengarnar í umfar í Føroyum, men tá hevði tú havt ein nógv størri vøkstur í almenna sektorinum. Í mun til tann samlaða búskapin er almenni sektorurin minkaður. Í dag hevur tú triðings býti millum almennar lønir, framleiðsluvinnu og fiskiskap.

– So her eru nøkur viðurskifti, sum eru komin í betri javnvág. Men nú ræður um at halda tørn ikki minst tá vit ikki hava nakað arbeiðsloysi - har tú kanst risikera, at tú fær eitt økt lønartrýst, har tú kemur at skapa eina óhepna inflatión og uppá longri sikt kemur at oyðileggja okkara vinnulív.

Hava ráð

– Men skulu tit til at yvirtaka og minka blokk, verður tá ikki neyðugt at skerja burtur dupultfunktiónir, hava vit t.d. tá ráð til trý sjúkrahus, til nýggjan Smyril, til undirsjóvartunnil til Norðoyggjar osfr.?

– Ja,tað hava vit.Vit hava eitt yvirskot uppá 650 mill, harav skulu vit gjalda eitt avdrag uppá 150 mill., so vit hava eitt netto uppá 500 mill.

Anfinn Kallsberg sigur víðari, at teir hava eina íløguætlan fyri komandi árini, sum fyri kommunur og land liggur uppá umleið 400 mill. kr. um árið, og tað er eftir hansara metan nokk til at viðlíkahalda hetta landið. -Vit skulu ansa eftir, í hvsssu er ikki nú vit hava fult arbeiði, at fara upp um tað. Í hesum liggur ein ávís útbyggingarætlan, so tað síggi eg ikki sum nakran trupulleika.

Oljuvinnan

Tað, sum kann gerast ein trupulleiki í framtíðini, er, at vit fáa eina nýggja vinnu, oljuvinnuna. Hvat hon kemur at skapa av krøvum ella av eftirspurningi av arbeiðsmegi kann sjálvandi gera, at vit knappliga ikki hava fólk til at manna bæði ein almennan sektor og ein vinnuligan. Og tá er vandin øgiliga stórur fyri galloperandi inflatión. Hinvegin haldi eg, at almenni sektoruirn sum einki kann tillagast við 50 mill. kr. um árið. Tí hyggja vit at útviklinginum, sum hevur verið seinastu árini, so er tað ein vøkstur á fíggjarlógini uppá 150 til 200 mill. kr. hvørt árið. Eg dugi ikki at síggja, at tað so ikki skal bera til at minka tann vøksturin við 50 mill. kr. um árið.

Fremur ikki samstarvið

SAMGONGUSTEV
Jan Müller

Herfyri skipaði Unga Tjóðveldið fyri fólkafundi á Vaglinum í Havn. Fleiri av røðarunum funnust rættiliga harðliga at løgmanni. Vit hava spurt Anfinn Kallsberg, um hetta hevur havt nakra ávirkan á samstarvið í samgonguni?

– Tá man fær slík persónlig høgg, sum eg fekk á Vaglinum henda dagin, so gevur tað einum nakað at hugsa um, og tað fær ein eisini til at ivast í nógvum tingum. Men hinvegin má man vera so mikið at sær komin, at man ikki letur persónliga forfongiligheit stýra einum og harvið ikki kunna arbeiða rationelt. Men tað er greitt, at hatta var ikki nakað, sum fremur samarbeiðið. Tað er so púra vist, og tað havi eg skrivað mær aftan fyri oyra.

Anfinn Kallsberg hevur ongan hug til at gera viðmerkingar til, hvør tað var, sum vann og tapti í stríðnum millum Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin herfyri. –Tað er ikki ein spurningur um at vinna. Men tað er greitt, at størsta stríðið stóðst av, at eitt mál var farið í tingið uttan at hava fingið neyðugu góðkenningina frá tí eina samgonguflokkinum. Tí vórðu greið boð givin um at taka tað aftur, sum varð lagt fram, meðan eg var í Bretlandi. Og tað varð gjørt sigur løgmaður og vísir til, at fólkaatkvøðan er so heldur ikki við í tí leistinum, sum er lagdur fram, og tá kann ein sjálvandi gera sær sínar tankar um, hvør vann ella tapti.

– Heldur tú, at loysnin, sum tú fekk ígjøgnum, hevur sissað teir ónøgdu í Fólkaflokkinum, sum hava hildið, at tit vóru farnir ov langt saman við Tjóðveldisflokkinum?

– Tað vil altíð vera eitt spenn í eins egna flokki, men man má hava álit á hvørjum øðrum. Politikkur er at samansjóva ting, sum røkka.